

Blái Krossur søkir:

# voluntør

Nýt nakrar mánaðar til hjálpararbeiði í Føroyum og uttanlands til at menna teg sjálvan!

Vit søknast eftir einum ungum persóni, sum í minsta lagi er 18 ár og ynskir at nýta millum 6 og 10 mánaðar til nakrar gevandi lívsroyndir í víttfevnandi arbeiðinum hjá Bláa Krossi. Alt verður lagt til rættis eftir tínum áhugamálum og førleikum.

### Tú kanst rokna við at

- taka lut í ymiskum fyrifallandi uppgávum á Blákrossheiminum í Havn, á umsorganarheiminum í Havn, ella á skrivstovuni í Runavík.
- arbeiða á Kafé Blákrossstovuni í Havn.
- er tað okkurt ávíst, tú dugir serliga væl, ella brennur fyri, kunnu vit eisini fáa tað upp í lag.

Sum nakað serstakt, fært tú møguleikan at vitja Bláa Kross í India og taka lut í arbeiði teirra í 1-2 mánaðir.

### Vit bjóða tær

- lummapengar – men onga løn!
- vit gjalda ferðina til India
- góðar starvsfelagar
- arbeiðsroyndir, sum gagna tær seinni í lívinum

### Vit rokna við at tú

- hevur hug at læra okkurt nýtt
- hevur hug at flyta persónlig mørk
- hevur áhuga í menniskjum og vilt vera nakað fyri onnur
- vilt arbeiða í samsvar við blákross-hugsjónina

### Freist

Umsóknarfreistin er 1. juli og ætlanin er, at tú byrjar sum voluntørur seinast í august mánaða, ella eftir avtalu við okkum.

Er hetta nakað fyri teg, send okkum nakrar reglur til: blakross@blakross.fo

Hevur tú spurningar, ella vilt vita meira hesum viðvíkjandi, kanst tú ringja til Hjalmar á tel 470700, ella 748894.

Blái Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

Heiðavegur 32, 600 Saltangará, www.blakross.fo